NOA® NOA

SILKE, HVÍTT

Kjóli (v.m.) 699,-
Kjóli, Binde 888,-

Nógv nýtt frá Noa-Noa og Tone Barker

Vit eru í HM-hýri:
2 HM-Tilboð:

Noa-Noa Cowboyjakki
Normalprísur 599,-
ST. M-L-XL
Nú 299,-

Noa-Noa Cannastaska
Normalprísur 118,-
Svørt, Khaki
Nú 88,-

29 Í Tróndargøtu
tel. 318200
218199

Opið er:
Mán.-Hósd. 9-18
Fríggjadag 9-19
Leygardag 9-14

Sosialurin -har tað hendir

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3367
Navn: Sp/f Steinbrot

Adressa: Blankagøta 16, 100 Tórshavn

Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 01.06.2002
Viðtøkudato: 01.06.2002
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kr. 80.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnari: Sp/f Hjálpirót, 100 Tórshavn (Sp/f 1125)
Nevnd: Torben Schneider, Gróthúsvegur 7, 188 Hoyvík (formaður), Andras Olsen, Skemmingsgøta 5, 100 Tórshavn og Karl Niclas Sigvald Djurhuus, Gróthúsvegur 7, 188 Hoyvík.
Stjórn: Andras Olsen, Skemmingsgøta 5, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum.
Grannskoðari: : Sp/f Revisión v/ Kaj Joensen, Stoffalág 4, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 01.06.2002 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka lastbilakoyring, anleggsarbeiði, útgrevstur og annað virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 11. juni 2002

Kristin Balle

Internet
Sosialurin
www.sosialurin.fo

Handilslærlingur

til Teymavirkið í Runavík

Teymavirkið P/f í Runavík sóknast eftir handilslærlingi at byrja skjótast møguligt.

Vit bjóða eitt starv á einum fjølbroyttum arbeiðsplássi í støðugari menning, har samstarv við arbeiðsfelagar, veitarar og kundar er av alstórum týdningi.

Vit vænta, at tú ert fyrikomandi og hevur hug og áræði at gerast partur av okkara arbeiðsdegi, sum við hvørt er eitt sindur strævin, men hóast tað stuttligur.

Umsókn við avriti av prógvum, møguligum ummælum og CV skulu verða Teymavirkinum, Boks 210, 620 Runavík, í hendi í seinasta lagi mánadagin 17. juni 2002.

Meiri fæst at vita við at venda sær til Eyðvør Berg á tlf. 473 000.

Teymavirkið í Runavík og Snørisvirkið í Klaksvík, eru einastu fyritøkur í Føroyum, ið framleiða línu, teymar og togverk. Afturat skipshandlunum, har m.a. arbeiðsklæði og trygdarútgerð er at fáa, hava bæði virkini búnýtis- og klædnadeildir. Í alt eru 20 fólk í starvi hjá Teymavirkinum og Snørisvirkinum.

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi grunn:

Skrásetingar-nr. 3350
Navn: Sparikassagrunnurin
Adressa: Yviri við Strond 2, 100 Tórshavn.
Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Grunnsmyndugleiki: Erhvervs og Selskabsstyrelsen
Stovningardato: 05.04.2002
Viðtøkudato: 05.04.2002
Stovnsfæ: Kr. 25.000.000,00
Inngjaldingarháttur: Kr.25.000.000,00 í øðrum virðum til kurs 3.195,5649.
Stovnari: Sjálvsognarstovnurin Føroya Sparikassi, Yviri við Strond 2, 100 Tórshavn.
Nevnd: Petur F. Zachariassen, N. Mohrsgøta 11, 100 Tórshavn (formaður), Súni í Hjøllum, 650 Toftir (næstformaður), Signa Dimon, 950 Porkeri, Finnbogi Niclasen, 380 Sørvágur, Olga Kallsberg, Gæsugøta 22, 100 Tórshavn, Jaspur Olsen, 350 Vestmanna, Jonna Krog Poulsen, 210 Sandur, Elinborg Jacobsen, í Heiðum, 370 Miðvágur, Tórmund A. Jacobsen, Millum Gilja 52, 188 Hoyvík, Bergun Kass, Jóansgøta 31, 188 Hoyvík, Rakul Dam, Orknoyarvegur 3, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Grunnurin verður teknaður av nevndarformanninum saman við einum nevndarlimi ella av trimum nevndarlimum í felag.
Grannskoðari: P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn og P/F Grannskoðaravirkið Inpact, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn. Roknskaparár: 01.01. - 31.12.
Fyrsta roknskaparár: 05.04.2002 - 31.12.2002
Endamál: Endamál grunnsins er at reka virksemi í sjálvsognarstovninum Føroya Sparikassa víðari í Føroya Sparikassa P/F, soleiðis at hetta altíð verður ein kappingarførur og tryggur peningarstovnur, og at reka annað figgjarligt virksemi gjøgnum íløgur í partabrøv, aðrar kapitalpartar og umbýtilig virðisbrøv í vinnurekandi virkjum av øllum sløgum. Inntøkur, ið nevndin í einum roknskaparári ikki nýtir til tess at røkka endamálsásetingunum omanfyri, kunnu flytast til seinni roknskaparár. Nevndin kann tó taka avgerð um at leggja eina upphædd í grunn at nýta til vælgerandi ella almannagagnlig endamál.

Skráseting Føroya tann 10. juni 2002

Kristin Balle

Leiðari til útibarnagarð úti í Grøv í Klaksvík

Klaksvíkar kommuna er í ferð við at seta á stovn útibarnagarð úti í Grøv og søkir í hesum sambandi eftir leiðara, við námsfrøðiligari útbúgving.

Talan er um ein kommunalan stovn, har pláss er fyri 40 børnum í aldrinum 3 til 7 ár.

Barnagarðurin er í einum náttúruríkum og avbjóðandi umhvørvi tætt við haga og fjøru.

Endamálið við stovninum er millum annað:
- at skapa álit og tryggleika, bæði fyri foreldur og børn, soleiðis at foreldur ekkaleys kunnu fara til arbeiðis og vita sær, at børnini eru í góðum hondum.
- At seta seg inn í støðuna hjá tí einstaka barninum.
- At skapa fjølbroyttar menningarmøguleikar í einum skapandi umhvørvi.
- At hava gott foreldra og starvsfólkasamstarv.

Lønar og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Jancy B. Klein tlf. 224474.

Umsókn saman við viðmælum og upplýsing um útbúgving og royndir, skulu vera

Klaksvíkar kommunu,
postboks 2, FO-700 Klaksvík,

í hendi í seinasta lagi 30. juni 2002.

Handilslærlingur til Ítróttarhandil

Søkt verður eftir lærlingi til ítróttarhandil okkara at byrja skjótast tilber. Arbeiðið umfatar alt vanligt handilsarbeiði so sum kundaavgreiðsla, prísmerking/útpakking av vøru, móttøka og avgreiðsla av ordrum.
Tað er eisini møguleiki fyri at næmingurin kemur at luttaka á ítróttarmessu í Danmark.

Tað er eitt krav, at umsøkjarin hevur HH ella FHS. Lærutíðin er 2 ár við HH og 3 ár við FHS. Í hesum tíðarskeiðnum skal næmingurin 3 ferðir 14 dagar á skúla í Danmark.

Vit vænta at tú ert fryntlig/ur, hevur góð samstarvsevnir, møtir til tíðina, dugir væl at umgangast fólk og ikki bangin fyri at taka eina eyka hond í tá á stendur.

Um tú ert tann rætti, kunnu vit bjóða tær eina spennandi lærutíð við nógvum avbjóðingum samstundis sum møguleiki er fyri at halda fram í fyritøkuni eftir lokna lærutíð.

Umsóknir við viðmælum verða at senda til:

P/f Thomas Dam Ítróttur
Postsmoga 268
FO-110 Tórshavn

Handilslærlingur til Skemmuna

Gerst lærlingur og fá nógvar fyrimunir!

- **Møguleika fyri altjóða útbúgving**
- **Spennandi smásøluútbúgving við egnum skúla**
- **Møguleika fyri arbeiði í útlandinum við stórum avbjóðingum**

Vit vænta av tær:
At tú ert samstarvsfús/ur, ert sjálvstøðug/ur, hevur nógva orku og áræði, er opin og ikki bangin fyri at siga tína meining.

Tú verður skjótt til nakað um tú sjálv/ur vilt:
Tað er einki óvanligt, at ein næmingur í Skemmuni verður tilnevndur deildarleiðari stutt eftir lærlingatíðina, takkað verið teimum avbjóðingun hann fær. Tað eru nógv sum verða verandi í Skemmuni tá tey eru liðug at læra, og møguleikarnir eru nógvir. Í 16 ár hevur Skemman saman við deildum sínum í øðrum londum skapt meiri enn 300 arbeiðspláss. Og tað legst afturat ár um ár. Skemman hevur nú deildir í hesum londum:
Íslandi, Canada, Letlandi og Litavia.

Skúlagongd:
Skúlagongdin fer fram í Danmørk.
Sjálvt skúlauppihaldið undir lærlingaútbúgvingini fer fram á "Jysk" skúla í Norður-Jútlandi. Útbúgvingin fer fram á stats viðurkendan hátt (øll almenn krøv verða fylgd), har tú,afturat teimum kravdu lærugreinunum, eisini fær nógv størri fakliga kunnan enn gjøgnum vanliga handilsútbúgving.
Gjøgnum skúla-uppihaldið býrt og etur tú á skúlanum saman við hinum lærlingunum. Hetta gevur eitt einastandandi samanhald til langt eftir lærlingatíðina.

Krøv:
At gerast lærlingur í Skemmuni krevst FHS ella onnur miðnámsútbúgving.

Nær skalt tú byrja?
Lærlingaplássini skulu setast so skjótt sum møguligt.

Ljóðar hetta spennandi?
Send so eina skrivliga umsókn skjótast gjørligt til

team 85

SKEMMAN
Staravegur 7 100 Tórshavn Tel 315588
skemman@skemman.fo

Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg